# ítróttur

**Nr. 209 • týsdagur • 1. november 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo**

# Met-luttøka til triathlon

**Tá Føroya Triathlon Felag sunnudagin skipaði fyri kapping á OL-teininum, vóru so nógvir íðkarar, at byrjað var í tveimum riðlum**

TRIATHLON
*Tíðindaskriv*

Fyrst fóru teir íðkarar, ið ætlaðu sær at royna triathlon á einum styttri teini. Hesi vóru øll unglingar 13-14 ár.

Síðani fóru tey vaksnu, ið kappaðust um FM-heitið.

Hjá unglingunum vóru tað Høgni Miné-Rasmussen og Bjørg Seloy, ið komu best frá svimjingini. Men so kom tann gloymda 4 greinin í triathlon, skiftingin millum ítróttagreinarnar.

Her var Bjørg aftur skjótast hjá gentunum, meðan Sigmundur Dahl skifti skjótast hjá dreinginum.

Á súkkluteininum var tað so aftur Høgni, ið var skjótastur av dreingjunum, meðan Helena Gunnarsdóttir Jacobsen stóð seg best hjá gentunu.

Á renniteinunum vístu Rannvá Djurholm og Jákup Joensen, at tey vóru best til hesa ítróttagrein.

Tá komið var um málstrikuna, vóru tað Høgni Miné-Rasmussen og Helena Gunnarsdóttir Jacobsen, sum vóru fyrst.

Pauli Holm Norðfoss gavst tá hann hevði súkklað hálvan teinin, hann fekk eitt astma annfall, og ikki var møguligt hjá honum at halda fram. Hann lá annars væl fyri aftaná svimjingina og fyrsta skiftið.



*Gunnar Dahl-Olsen gjørdist føroyameistari í 1/4 triathlon. Her sæst hann í hylinum*

**Gunnar Føroyameistari**

Hjá teimum vaksnu var tað Eli Christiansen, sum var fyrstur upp úr hylinum, men Gunnar Dahl Olsen skifti hesaferð skjótastur. Og tá hann eisini súkklaði skjótast, so var ikki nóg mikið hjá Eli at renna eitt sindur skjótari. Meira skuldi til, og vann gunnar og gjørdist føroyameistari í 1/2 triathlon 2005.

Jákup Johansen, Beinir Rasmussen of Evald Rasmussen vóru so at siga javnir, og fóru mestsum í senn út á súkkluteinin. Fyrstu løtuna var Beinir á odda, men so yvirháløði Jákup hann og Evald fylgdi við. Jákup økti, og í Kaldbak fór Beinir fram um Evald, sum misti takið. Beinir punkteraði á Sundi, men súkklaði til Havnar, skifti súkklu og fór út á renniteinin beint framman fyri Evald. Í renningini vísti Evald seg at vera sterkastur, og skjótt yvirháløði hann Beinir, men fekk ikki fatur í Jákupi, sum hevði roknað við hesum og tí satsað alt upp á súkklingina, og tað lukkaðist.

Andrass Joensen og Kári Simonsen høvdu eina løtu eina spennandi kapping. Andrass svam og skifti skjótari enn Kári, sum hinvegin súkklaði skjótari, men ikki nóg mikið til at halda Andrass aftanfyri í renningini.



*Sóley í Eyðanstovu var einasta kvinnan, sum tók lut í kappingini. Og hóast vantandi kappingina, hevði hon eina góða tíð*

Bara Sóley í Eyðanstovu umboðaði kvinnurnar í kappingini, og gekst væl hjá henni, hóast hon alla tíðina var uttan kapping, og tí ongantíð var pressað. Hon megnaði bæði í svimjingini og renningini at verða skjótari enn nakrir av monnunum.

Næsta kappingin hjá Triathlon-felagnum verður liðkappingin, og eisini her tykist áhugin vera sera stórur. Soleiðis siga fyrireikararnir, at longu nú hava eini 12-15 lið boðað frá luttøku.

**Úrslitini - 1/12 triathlon-gentur.**

| Nr. Íðkari | Svimjing | 1. Skift | Súkkling | Renning 1 | Renning 2 | Renning 3 | Samlað |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Helena G Jacobsen 93 | 5.23 | 2.18 | 0.30.17 | 5.11 | 5.25 | 5.05 | 0.53.39 |
| 2 Rannvá Djurholm 92 | 7.13 | 2.30 | 0.30.51 | 4.12 | 4.22 | 4.05 | 0.55.12 |
| 3 Bjørg Seloy 92 | 4.32 | 1.57 | 0.33.27 | 6.22 | 6.08 | 5.22 | 0.55.45 |

**1/12 triathlon-dreingir.**

| Nr. Íðkari | Svimjing | 1. Skift | Súkkling | Renning 1 | Renning 2 | Renning 3 | Samlað |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Høgni Miné-Rasmussen | 4.31 | 2.15 | 0.27.51 | 4.43 | 5.11 | 5,01 | 0.49.34 |
| 2 Jákup T Joensen | 8.36 | 2.58 | 0.31.00 | 4.11 | 4.26 | 4.17 | 0.55.29 |
| 3 Sigmundur Dahl | 6.11 | 1.37 | 0.31.58 | 7.53 | 7.05 | 6.37 | 1.01.23 |
| 4 Pauli Holm Norðfoss | 4.48 | 1.44 | Fekk astma | anfall og | gavst | | |

**1/4 triathlon-menn.**

| Nr. Íðkari | Svimjing | 1. Skift | Súkkling | Renning 1 | Renning 2 | Renn 10 km | Samlað |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Gunnar Dahl Olsen | 23.46 | 1.28 | 1.05.30 | 22.15 | 22.13 | 44.28 | 2.15.13 |
| 2 Eli Christiansen | 22.16 | 1.59 | 1.10.25 | 21.16 | 21.15 | 42.31 | 2.17.11 |
| 3 Jákup Johansen | 24.20 | 3.02 | 1.17.43 | 25.35 | 25.55 | 51.30 | 2.36.35 |
| 4 Evald Rasmussen | 24.32 | 2.59 | 1.23.53 | 23.30 | 23.33 | 47.03 | 2.38.28 |
| 5 Andrass Joensen | 27.59 | 2.07 | 1.26.14 | 24.35 | 23.35 | 48.10 | 2.44.30 |
| 6 Beinir Rasmussen | 24.50 | 2.13 | 1.23.27 | 27.35 | 29.42 | 58.18 | 2.47 37 |
| 7 Kári Simonsen | 29.38 | 3.15 | 1.24.32 | 26.03 | 26.31 | 52.34 | 2.50.09 |

**1/4 triathlon-kvinnur.**

| Nr. Íðkari | Svimjing | 1. Skift | Súkkling | Renning 1 | Renning 2 | Renn 10 km | Samlað |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Sóley í Eyðanstovu | 29.18 | 3.45 | 1.27.13 | 27.14 | 28.36 | 55.50 | 2.55.10 |

# Trý stig til Claus

**Eftir leikbannið hevur føroyski landsliðsspælarin endurvunnið plássið millum teir fyrstu ellivu í Coventry**

ONGLAND 1. DEILD
*Jóannes Hansen*

Úrtøkan hevur í fyrsta partinum av kappingini verið soltin hjá Coventry City og føroyska landsliðsspælaranum Claus Bech Jørgensen. Teir hava støðugt verið í vanda fyri at detta niður skeivu megin keðiligu strikuna.

Coventry er framvegis millum botnliðini. Teir eru bert eitt stig frammanfyri triði aftasta plássið, sum er tað besta niðanfyri strikuna. Men hesa ferð hilnaðist tað væl. Coventry hevði vitjan av Luton, sum telist millum teirra, ið kappast millum tey bestu, og Coventry vann 1-0. Málið fingu teir tíðliga í 2. hálvleiki.

Hetta var bara triði sigurin hjá Coventry í sekstan teimum fyrstu umførunum. Venjarin segði seg vóna, at góða úrtøkan hesa ferð fer at bera størri sjálvsálit við sær. Hann helt, at leikliga avrikið hesa ferð boðaði frá, at sjálvsálitið ikki er nóg stórt.

Claus Bech Jørgensen hevði undan vikuskiftinum tvær ferðir sitið uttanfyri, tí hann var leikbannaður. Nú hann var tøkur aftur, fekk hann pláss millum teir fyrstu ellivu. Claus var á vøllinum, inntil tað restaðu fimm minuttir.

Longu mikukvøldið skal Coventry aftur í eldin. Tá fara teir at fáa vitjan av gamla høvuðsstaðarfelagnum Stoke, sum eftir sekstan tey fyrstu umførini hevur fingið nítjan stig og harvið er trý stig frammanfyri Coventry.

# GÍ helt sessinum

**Sandoyingar byrjaðu við buldur og brak, men í longdini var tað ikki nóg mikið móti GÍ, sum við samanlagt 7-1 vissaði sær tilveruna í Formula-deildini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað var kanska sigandi, at Eli Hentze í 3-2 mánakvøldið avdúkaði Liverpool-troyggjuna, sum hann bar undir gula B71-búnanum.

Við tilvísing til ótrúligu vendina í Champins-League finaluni í Istanbul, so hevði B71 tørv á einum eins stórum undri. Aftan fyri 3-0 móti einum liði, sum alt árið á tamb hevur spælt í eini hægri røð, vóru treytirnar hjá sandoyingum klokkuklárar.

Og tað tóktist eisini, sum trúðu sandoyingar uppá, at uppgávan ikki var heilt ómøgulig. Teir løgdu bragdliga fyri, og tá Clayton Soares eftir bara fimm minuttum var skjótur at revsa Marcin Dawid í GÍ-málinum, kom spenningur í uppgerðina - í øllum førum í eina løtu.

Tí GÍ nýtti ikki langa tíð um at svara aftur. Langt útspark frá sama Dawid sveimaði allan vegin í B71-brotsteigin, og so kundi Krzystof Popczynski í sínum seinasta dysti fyri GÍ hálvflukta liðið móti bjargingini.

Og so varð mótbrekkan greið. Kaj Ennigarð stútaði fyri steðgin GÍ á odda, og tá sami Kaj í seinna hálvleiki skoraði eftir fríspark, gjørdist talan mest sum um avspáking hjá GÍ. Mótstøðan frá vertunum var nú eisini avmarkað, og móti dystarenda kundi Sverri Jacobsen so staðfesta sigurin.

Soleiðis vann GÍ samanlagt 7-1, og tey tølini eru somikið sannførandi, at tað neyvan kann vera ivi um, hvørt liðið aftur hevur uppiborið møguleikan í Formula-deildini.

**Fakta**

**B71-GÍ 1-4 (1-2)**
**GÍ í Formula-deildina við samanlagt 7-1**
1-0: Clayton Soares
1-1: Krzystof Popczynski
1-2: Kaj Ennigarð
1-3: Kaj Ennigarð
1-4: Sverri Jacobsen